# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2021

## 05.04.2021-03-21

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 03**<br>Tíð: **05. Apríl. 2021, kl. 20:00**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis:<br>Jacoba Ì Homrum fær ikki møtt, fráboðað. |
| <u>Fastir fundardagar:</u> | <u>Møttir:</u><br>Eyðbjørn Thomsen<br>Frits Poulsen<br>Halltóra Joensen<br>Niclas Hentze |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 03/01**<br>• **Summarferia í dagrøktini.** | • **Samtykt at hava stongt í 4 víkur í summar. Tó við møguleika, at foreldur sum hava brúk fyri ansing í hesum 4 vikunum, hava møguleikan at søkja um ansing, søkjast skal til dagrøktar leiðaran. Samtykt at halda fast við gjald í 12 mánaðir á sama mánaðargjald. H.J er ikki samd.** |
| **Mál nr. 03/02**<br>• **IRF aðalfundir.** | • **IRF hevur tømt tangar í Sumbiar sókn í 2010, jan 2014, nov-des 2015, apr-mai 2018 og jan 2021. Gjaldið er hækka næstan hvørt ár, og er hettar eitt árligt gjald. Aftur til komandi aðalfund er planurin at gjaldið hækkar. Sumbiar kommuna tekur ikki undir við, at gjaldið hækkar.** |
| **Mál nr. 03/03**<br>• **Leigusáttmáli matr.nr 243c.** | • **Samtykt at leingja hendan sáttmálan við teirri treyt, at um vatn (Kirvi) virksemi dettur niður fyri á matriklinum, so fellur hesum sáttmálin burtur.** |
| **Mál nr. 03/04**<br>• **Frítíðarundirvísing - Sumbiar kvøldskúli.** | • **Samtykt var at søkja eftir leiðara til frítíðarundirvísingina 2021 – 2022.** |
| **Mál nr. 03/05**<br>• **Umsókn um grundstykkið í Víkarbyrgi til summarhús.** | • **Sumbiar kommuna hevur eingi grundstykkir eftir á festiøki. Tey sum eru eftir í summarhúsaøki liggja inni á privatari ogn.** |
| **Mál nr. 03/06**<br>• **Asfaltering.** | • **Samtykt var at bíða við hesum.** |
| **Mál nr. 03/07**<br>• **Umsókn um stuðul Felagið Staðarnøvn.**<br>• **Umsókn um keyp av bókini Hagar og seyðamørk.** | • **Samtykt var at útseta hettar.**<br>• **Samtykt ikki at keypa hesa.** |
| **Mál nr. 03/08**<br>• **Umsókn um taðing.** | • **Samtykt eftir innsendur umsókn, og loyvið frá nærmasta granna. Eisini má øll onnur loyvir fáast til vega, so sum flutnings loyvið og annað.** |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 03/09**<br>• **Umsókn um keyp av uppískoyts stykki til matr nr 164d.** | • **Samtykt var ikki at taka undir við hesu umsókn. Hettar tí, at grundstykkir til summarhús seld seinast árini, ikki eru størri enn 350 m2. Aðrir umsøkjarar hava eisini fingið noktandi svar uppá størri grundstykkið enn 350 m2.** |
| **Mál nr. 03/10**<br>• **Uppskot til keyp av leikum til spælipláss í Lopra.** | • **Samtykt var, at tá í spæliplássið í Lopra skal gerast, so skal tað verða gjørt við kvalitets vøru. Og í ár eru eingin peningur settur av til endamálið á fíggjarætlanini.** |
| **Mál nr. 03/11**<br>• **Uppskot um keyp av bingju til endurnýtslu ting til bingju plássið.** | • **Samtykt at spyrja hinar kommununnar um samstarv hesum viðvíkjandi.** |
| **Til støðutakan ella lukkaðan fund.**<br>• **Skattainntøkurnar.**<br>• **Matr. nr. 122f og 151c.** | • **Kunna var um skatta inntøkunar.**<br>• **Samtykt var at seta hesu grundstykkir til sølu fyri 25.000,- kr/stk. Treyta av, at byggjast skal innan 2 ár, ikki er loyvið, at selja tey víðari, og selt verður bert til nýtslu til fastan bústað. Sumbiar kommuna tilskilar sær rætt, at velja ímillum innkomnu umsóknirnar. Um tú líkir hesar treytir, so er at verða fyrstir at søkja.** |

Fundurin lokin kl. 23:30

Eyðbjørn Thomsen  Frits Poulsen  Niclas Hentze

Halltóra Joensen